Martin Heinesen, leiðari á oljufyrisitingini:

Nógv oljufeløg vilja kanna undirgrundina

Áhugin fyri at gera nýggjar kanningar á føroyskum øki er stórur. Oljufyrisitingin fær vitjan av útlendskum feløgum í heilum og hetta er gott tekin heldur leiðarin á fyrisitingini, Martin Heinesen. Nógv virksemi er longu farið í gongd serstakliga í teirr hvítu sonuni - í Hetlandsrennuni - millum Føroyar og bretskt øki. Feløgini ota seg spakuliga longur og longur vestur eftir inn á føroyskt øki.

Jan Müller

Ikki færri enn enn seks stór útlendsk oljufeløg vitjaðu inn á gólvið hjá Oljufyrisitingini á Debesartrøð í farnu viku. Tey vóru Statoil, Mobil, Enterprice, Phillips Petroleum, Texaco og Conoco.

Ørindi teirra vóru at kunna føroyskar myndugleikar um, hvussu langt feløgini eru komin við at kanna føroysku undirgrundina. Tey hava øll so eisini ynski um at sleppa at halda fram við sínum kanningum hvør á sín hátt.

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini sigur við Sosialin, at tað er sjálvandi at fegnast um, at áhugin frá oljufeløgunum er so stórur. Tí tá verður arbeiðið so nógv hugaligari og lættari. Tað gevur so eisini okkum eina ábending um, at oljufeløgini framhaldandi halda at tað er vert at brúka tíð og orku til at kanna føroysku undirgrundina.

-Eg haldi tað gongur tann rætta vegin, nú áhugin hjá feløgunum bara økist. Í løtuni eru eini 20 feløg virkin á føroyska økinum. Hetta er umleið tað talið á feløgu, sum eisini arbeiða á bretskum øki.

Digicon og Geoteam

Teir viðgera í løtuni fleiri umsóknir um kanningarloyvi á føroyskum øki. Tvey feløg hava longu fingið loyvi at gera seismiskar kanningar. Tey eru Digicon og Geoteam. Hesar fyritøkurnar gera kanningarnar fyri egna rokning og selja so tilfarið til oljufeløgini aftaná.

Sera stórt virksemi er annars í tí hvítu sonuni millum føroyska og bretska økið. Hetta er umleið har Hetlandsrennan er. Bæðiu Digicon og Geoteam standa fyri rættiliga umfevnandi kanningum í hesum økinum.

Hyggja vit eftir Digicon, so tykist fyritøkan nærum hava specialiserað seg til júst at gera seismiskar kanningar í hvíta økinum millum Føroyar og Hetland.

Áhugavert er at bíta merki í, at sama økið, har Arcadian Searcher gjørdi kanningar fyri góðum ári síðani og har danska sjóverjuskipið bað tað fara burtur, tí tað var á føroyskum øki, har hevur felagið nú fingið loyvi til at gera seismiskar kanningar. Hetta er niðri í sjálvum landsgrunnshorninum á føroyska landgrunninum, umleið har fiskimarkið bendir av og fer í ein vestan. Partur av hesum økinum er eisini er við í komandi seismisku skjótingini hjá Statoil og hinum feløgunum í AMG bólkinum. So hyggur tú eftir tí seismiska virkseminum, sum fer fram millum Føroyar og Hetland í løtuni og sum fer at taka seg upp, snýr tað seg um økini kring Hetlandsrennuna.

Digicon ein gamal kenningur

Digicon er annars ein gamal kenningur. Hetta felagið var við til at bjóða uppá seismikkin fyri tveimum árum síðani, tá Western fekk arbeiðið. Vit kenna eisini Digicon frá tí diplomatiska stríðnum, sum tók seg upp fyri góðum ári síðani, tá eitt av seismisku skipunum hjá felagnum, "Arcadian Searcher" varð skuldsett fyri at hava skotið seismikk inni á føroyskum øki. Hetta málið kom uppá á hægsta stig í Føroyum, Danmark og Bretlandi, endin var kortini, at tað varð avgreitt í sátt og semju. Men enn tann dag í dag er óvissa um, antin skipið hevði skotið seismikk á føroyskum øki ella ikki.

AMG vil skjóta seismikk

Nú hevur so AMG samtakið sum fyrsta oljufelagið, ið arbeiðir á Føroyaleiðunum biðið um loyvi at fara undir sína egnu seismisku kanningarnar.

Talan er tó ikki bert hjá útlendskum feløgunum at fáa loyvi til seismiskar kanningar. Tað snýr seg eisini um annað slag av kanningum eitt nú á havbotninum og á landi.

40 søktu um starv sum verkfrøðingur

Stóri áhugin fyri føroyska økinum leggur eisini nýggjar og størri arbeiðsbyrðar á rættiliga nýggju og ungu oljufyrisitingina.

Herfyri varð lýst eftir verkfrøðingi og ikki færri enn 40 søktu starvið. Martin Heinesen sigur, at tað er ikki sett enn. Teir hava annars sett ein skrivara at byrja 1. mai.

DGU fær allar upplýsingar

Nú so nógv tjak hevur tikið seg upp um útbjóðingina av nýggju. Í opransóknini spurdu við leiðaran á Oljufyrisitingini, hvat verður av øllum kanningarúrslitunum, sum DGU í Danmark (Danmarks Geologiske Undersøgelser) fær í samarbeiði sínum við jarðfrøðisavn og oljufyrisiting - um ikki danskar fyritøkur tá automatiskt hava atgongd til hesar upplýsingar, nú DGU er ein almennur tænastustovnur.

Til tað sigur Martin Heinesen, at teir leingi hava havt sera gott samarbeiði við DGU, sum sjálvandi eisini má handfara hetta tilfar í trúnaði.

-DGU ger nógvar uppgávur fyri oljufeløg einsvæl og teir hava samstarv við okkum. Tað vildi vera tað reina sjálvmorð, um ein granskingarstovnur sum DGU lat fortróligar upplýsingar, sum teir fáa frá okkum, víðari til danskar fyritøkur. Slíkt ber ikki til og slíkt verður ikki gjørt í hasi bransjuni sigur leiðarin á oljufyrisitingini, sum kennir seg púra tryggan við samstarvið við DGU, sum fyri kortum varð lagt saman við grønlendsku deildini, soleiðis at tað í dag tekur sær av jarðfrøðiligum spurningum bæði í Grønlandi og Føroyum umframt í Danmark.

The Hydrocarbon Prospectivity of the UKCS North Atlantic Margin

The White Zone
an integrated regional study by ERC Tigress

Aims

- Project the known Faroe Shetland geology west to the White Zone
- Provide a regional stratigraphic framework for the White Zone
- Test the regional & westward extent of the Lower Paleogene plays
- Test extent of Pre-Tertiary plays
- Provide predictive model for sub basalt geology to the west
- Model source distribution, quality and hydrocarbon generation to the west
- Investigate individual western margin basins and sub basins
- Provide a framework to build on
- Provide digital maps of regional events and reservoir potential units
- Provide a link with ERC West of Hebrides & Møre Basin studies

Materials

- 15 western margin calibration wells
- 10,660Km Seismic
  - PGS NOPEC SFE-95
  - PGS NOPEC-DIGICON WS-94 (Selected lines)
  - PGS NOPEC-DIGICON SF-94
  - DIGICON DEL 93
- Available gravity and magnetic data
- Surface seep information
- Provide a regional stratigraphic framework

Timing

- Pre commitment discount available to 31st December
- Start February 1996
- Completion date August 1996

Please contact
Chris Matchette-Downes
ERC Tigress Limited

A member of the PGS Group

Frá Norðoya Fólkafloksfelag

Aðalfundur og fyrsti uppstillingarfundur til býráðsval!

Árligi aðalfundur felagsins og fyrsti uppstillingarfundur til býráðsval verður á **Klaksvíkar Sjómansheimi**
25. mars, kl. 19.30

Løgtingsumboð floksins luttaka á fundinum.

Vegna Norðoya Fólkafloksfelag
Nevndin

Deyvafelag Føroya

Skrivstovan í Deyvahúsinum -Effata-, Íslandsvegur 10 B, er opin mánadag-fríggjadag frá kl. 9–13. Telefon 17597. Telefax 13609. Teksttelefon, ring 0032 og bið um 16929. Limafundur hvørt mánakvøld kl. 19–23.